# Krabbameinsútgreining
# Krabbamein hjá børnum
# Illgruni um leukæmi

## Sjúkueyðkenni, ið skulu geva illgruna um leukæmi hjá børnum

Illgruni um leukæmi hjá børnum íkemur, tá eitt ella fleiri av sjúkueyðkennunum niðanfyri eru tilstaðar:

- Afturvendandi- ella drúgv infektiónstekin
- Tekin á blóðmangul
- Lyndi til at bløða óvanliga illa
- Pínu í beinagrind, liðum ella haltan > 1 viku uttan aðra upplagda orsøk
- Hepato- ella splenomegali uttan aðra upplagda orsøk
- Ífylla í eitlum í einum ella fleiri økjum (sí eisini eitlakrabbi á hálsinum og krabbi í thorax, abdomen, beinagrind og bleytlutum)
- Almenn sjúkueyðkenni  
  * Fepur uttan aðra upplagda orsøk > 1 viku  
  * Vánaligur trivnaður  
  * Húðskriði
- Skeivar blóðroyndir við minst einum av fylgjandi  
  ↓ hæmoglobin, leukocyttar ella trombocyttar  
  ↑ leukocyttar, LDH, urat ella SR

## Grundaður illgruni

Grundaður illgruni íkemur, tá:

- Ávirkað mergfunktión við tveimum ella trimum kyknulinjum (anæmi, trombocytopeni, leukopeni ella leukocytosu)
- Illgruni um blastar í periferum útstroki
- Mergávirkan í einari linju aftrat einum ella fleiri av niðanfyristandandi:  
  * Pína í beinagrind, liðpína ella haltan > 1 viku uttan aðra upplagda orsøk  
  * Hepato- ella splenomegali uttan aðra upplagda orsøk  
  * Eitlavøkstur  
  * Almenn sjúkueyðkenni, lýst omanfyri, saman við hækkaðum LDH ella urat

Um grundaður illgruni er til staðar, skal beinanvegin ringjast til vakthavandi barnalækna á LS

## Kanningar hjá kommunulækna

Klinisk kanning av barninum og blóðroyndir (hæmoglobin, leukocyttar, diff. teljing, trombocyttar, LDH og urat)

## Ávísingin

Ring fyrst til barnalækna um barnið

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Pædiatri - Illgruni um leukæmi" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026